# ítróttur

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fótbóltsmentan á Tórsvølli

**Áskoðararnir á Tórsvølli hóskvøldið kunnu uttan iva gleða seg til at síggja, hvussu fótbólturin úr einum av fremstu fótbóltsskúlunum í Europa sær út**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Talan verður uttan iva um eina sera trupla uppgávu, tá GÍ á Tórsvølli tekur ímóti Kroatiska Hajduk Split. Ja, kanska tann truplasta hjá GÍ, síðani teir á sinni spældu heimadyst ímóti skotska stórfelagnum, Glasgow Rangers.

### Eingin ársungi

Hajduk Split er nevnliga eingin ársungi í europeiskum høpi. Tá liðið var partur av gamla jugoslavia, vóru teir annar parturin í æviga tvídystinum um jugoslaviska meistaraheitið, og tó at Reyða Stjørna sum oftast var stinnari parturin, so hendi tað seg meira enn so, at proletararnir úr Split fingu knógvað stórfelagnum.

Ikki minst kundi hetta lata seg gera, tí felagið ígjøgnum mong ár hevur uppalt eina framúrskarandi fótbóltsmentan, sum man teljast millum tær fremstu í Europa. Javnan var tað jú soleiðis, at bestu leikararnir meira ella minni vórðu noyddir at skifta til Reyðu Stjørnu, so skuldi Hajduk teljast millum tey stóru, var alneyðugt hjá teimum við einum framhaldandi arbeiða at finna og uppala evnaríkar fótbóltsleikarar.

*Tó at kroatiska liðið sýndi eina mest sum ræðandi styrki á heimavølli, so hevur GÍ-liðskiparin, Magni Jarnskor, góðar vónir undan dystinum hóskvøldið*

Úr Gøtu eru boðini eftir fyrra dystin eisini greið, nú teir gera seg til at taka ímóti kroatisku gestunum.

– Eg skal ikki siga, at hatta er besta lið, sum eg havi leikt ímóti, men millum tey sterkastu er tað so avgjørt. Í útidystinum vóru teir omaná í mest sum øllum lutum, so tað er einki at ivast í, at vit hava eina sera trupla uppgávu, heldur Magni Jarnskor, sum avgjørt má teljast millum veteranarnar á GÍ liðnum.

### Vónir um javnleik

Hóast hesa sannroynd, so hevur GÍ-liðskiparin á ongan mist vónina um at fáa eitt líkinda úrslit burtur úr dystinum hóskvøldið, og tað vildi heldur líkst gøtumonnunum, um teir soleiðis góvu skarvin yvir undan dystarbyrjan.

– Tað sigur seg sjálvt, at vit fara á vøllin at gera okkara besta, og vit ætla okkum eisini at fáa eitt gott úrslit. Og fyri okkum merkir eitt gott úrslit í minsta lagi javnleikur, heldur hann.

Og tað er eisini okkurt, sum bendir á, at hóast Hajduk framhaldandi hevur eitt gott lið, so verður talan kanska ikki um heilt so trupla uppgávu hesaferð, sum var tað í Split til fyrra dystin.

Í heimligu kappingini skal Hajduk sunnudagin spæla toppdyst, og tað kann merkja, at onkrir leikarar verða spardir hesaferð, og so fer tað helst eisini at gera mun, at teir nú hava eina 3-0 leiðslu at dúva uppá.

Og tó at talan gjørdist um ein tryggan og uppibornan sigur í fyrra dystinum, so iðrar Magni seg kortini um, at tapið har niðri gjørdist somikið stórt.

– Sjálvandi vóru teir betra liðið, men tvey av teimum trimum málunum hava vit mest sum skuldina fyri sjálvir, so fáa vit rættað okkara mistøk, er kanska ikki so langt á mál.

Um liðið hjá GÍ, sigur Magni, at teir hava allar mans tøkar til dystin.

– Verður sæð burtur frá Henning Jarnskor og Áslaki Petersen, sum báðir eru fluttir niður til Danmarkar, so hava vit allar mans tøkar, og eg rokni eisini við, at byrjunaruppstillingin fer at verða á leið hin sama, sum hon var, tá vit sunnudagin spældu móti HB.

– Tá vit vóru í Split hevði Johan valt at spæla við einum áleypara, men hesa ferð verður helst talan um tveir. Bæði tí arbeiðsumstøðurnar har frammi á vøllinum tá verða munandi betri, og so rokni eg ikki við, at vit verða heilt so nógv trýstir, nú teir hava trý mál at geva av, sigur Magni Jarnskor at enda.

## FCK fær tørv á skjótleika

**Lítið er at ivast í, at Todi Jónsson verður við frá fyrsta bríksli, tá FCK á útivølli skal verja 3-1 leiðsluna móti georgiska Kutaisi**

UEFA-CUP
*Jákup Mørk*

Ferðalagið hjá FCK fór mikudagin til Georgia, har teir hósdagin skulu spæla seinna UEFA-Cup dystin móti Kutaisi. Fyrra dystin í Parkini vann FCK 3-1, og tí er einki at taka seg aftur í, at danska høvuðsstaðafelagið er favorittur undan dystinum. Eisini hóast tað á ongan hátt kann metast sum nøkur løtt uppgáva at spæla útidyst í Georgia.

### Todi helst við

Í fyrra dystinum millum liðini var Todi dagsins maður hjá FCK, tá hann fyrst javnaði georgiska leiðslumálið, og síðani skeyt týdningarmikla málið til 3-1. Og tó at donsku bløðini hava gjørt nógv burturúr, at Todi var at finna á beinkinum móti Brøndby leygardagin, so er lítið at ivast í, at føroyingurin hesa ferð verður partur av álopinum, og allar helst saman við Sibusiso Zuma.

FCK-venjarin, Hans Backe, hevur nevnliga somikið góðar leikarar at taka av, at hann altíð kann laga seg eftir, hvussu mótstøðan spælir. Leygardagin merkti hetta, at hann tók fysiskt sterku Petterson og Møller fram um kviku Jónsson og Zuma, men hesa ferð er støðan helst øvugt. Einki er at ivast í, at FCK í stóran mun fer at dúva upp á skjót snarálop, og til hetta slagið av fótbólti er neyvan nakað betri álopspar í Danmark enn føroyska/suðurafrikanska duettin. Spurningurin er so bert, um venjarin



*Tá talan er um kontraspæl, telist Todi millum teir bestu í Danmark, og tí er lítið at ivast í, at hann verður við frá fyrsta bríksli hóskvøldið*

heldur letur Zuma sleppa at hvíla seg, eftir at hann hevur verið eitt sindur plágaður av skaðum í seinastuni.

## U-19 landsliðið úttikið

**Álvur Hansen hevur sent boð eftir 18 leikarum, nú U-19 landsliðið hjá kvinnum skal royna seg í EM-minikapping**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrst í oktober mánaði skal føroyska U-19 landsliðið í kvinnufótbólti royna sg í sonevndari EM-minikapping í bulgarska høvuðsstaðnum, Sofia.

Fyrireikingarnar til ferðina eru nú av álvara farnar í gongd, og í dag hevur landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, boðsent 18 leikarum til bæði venjingardystir og venjingar undan fráferðini.

Tær 18, sum manna landsliðshópin, eru hesar: Randi Wardum, Kristina D. Simonsen, Linda Weihe, Malan á Dunga, HB, Jóhanna Ólavsdóttir, Elsa Maria Simonsen, Petra Sjóstein, KÍ, Asta E. Magnussen, Maria Michelsen, Elin Katrina Haraldsen, AB, Rósmari Haraldsen, Selma D. Erol, Ása Christiansen, Ása Dam á Neystabø, Unn Kragesteen, Heidi Hansen, B36, Maibritt Olsen, Mary Ann Isaksen, B68.

Við á ferðini verða eisini landsliðsvenjarin, Álvur Hansen og hjálparvenjari hansara.



## KÍ stendur fyri stórari avbjóðing

**Setningurin er at byrgja uppfyri, at gongdin í dag ikki skal líkjast henni í ungverska høvuðsstaðnum fyri fimm árum síðani, tá klaksvíkingar orduliga fóru niður við nakkanum**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*



*Hóast klaksvíkingar aftur hesa ferð hava ætlanir um at spæla sítt egna spæl, so skerst ikki burtur, at stórur dentur helst verður lagdur á verjupartin hóskvøldið*

Stóra KÍ ferðalagið kom tíðliga týskvøldið í øllum góðum niður til ungverska høvuðsstaðnum Budapest. Donau skikkar sær betri, enn tað eina tíð kundi sæð út til, at hon skuldi gera, og tað er greitt, at dysturin verður spældur seint seinnapartin føroyska tíð.

Fyri fjúrtan døgum síðani megnaði KÍ 2–2 á Svangaskarði. Allan Mørkøre skoraði bæði málini, sum vóru tey fyrstu í europeisku liðkappingini hjá vetaraninum, sum 22. november verður 31 ár. Tað var eitt sera gott úrslit ímóti Újpesti.

Men sjálvandi er ungverska liðið stórfavorittur at vinna í dag og harvið at vera við í lutakastinum til næsta umfarið. Lutur verður kastaður á UEFA høvuðsborgini í Sveis í morgin.

KÍ hevur eina ferð áður spælt í Budapest ímóti Újpesti. Tað var í 1997, tá liðini eisini hittust í UEFA Cup kappingini. Ta ferðina varð fyrri dysturin spældur í Budapest. 23. juli í 1997 tapti KÍ 6–0. Tann dystin bar til at fylgja í Sjónvarpi Føroya. Longu tá fimm minuttir vóru farnir kom hol á, og í sera nógva hitanum gekk skjótt. Tá spælararnir fóru til sera kærkomnu hvíldina, var støðan 5–0. Í 2. hálvleiki fekk heimaliðið eitt mál afturat, og tí var eingin spenningur, tá teir eina viku seinni vóru á Svangaskarði. Tá stóðu klaksvíkingar seg heilt væl. KÍ var á odda bæði 1–0 og 2–1, men í síðstu løtu eydnaðist tað Újpesti at skora til 3–2.

Hesa ferð var fyrri dysturin í Føroyum. Tað kann ivaleyst verða ein fyrimunur hjá KÍ. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað verður ikki neyðugt hjá ungverska liðnum at vinna stórsigur fyri at byrgja uppfyri torføru uppgávuni í Føroyum. Tað er nóg mikið hjá ungverjunum at vinna við einum máli.

Kurt Mørkøre segði undan Europa Cup luttøkuni, at KÍ ætlaði at spæla sítt spæl, og tað gjørdu teir eisini á Svangaskarði. Men sjálvandi fer størri dentur at verða lagdur á verjupartin í dag. Venjarin og spælararnir vilja sjálvsagt sleppa undan eyðmýkingini, sum teir løgdu rygg til fyri fimm árum síðani.

Ta ferðina gjørdu klaksvíkingar eina rúgvu av persónligum mistøkum. Hitin er ikki so nógvur hesa ferð, sum hann var fyri fimm árum síðani. Um tað slepst undan so mongum persónligum mistøkum hesa ferð, sum vórðu gjørd seinast, so átti tað ikki at verið heilt ómøguligt at komið undan við heiðurligum úrsliti. Eitt heiðurligt úrslit í hesum sambandinum er eitt tap upp á 3–0 ella minni enn tað.

KÍ hevur nógvar royndir í Europa Cup, og fleiri spælarar, sum vóru við í fyrsta dystinum á Svangaskarði ímóti Skonto Riga í 1992, eru framvegis við. Talan er um Harley Bertholdsen og Jan Andreasen, sum báðir hava verið nógv á beinkinum seinastu ferðirnar, Allan Mørkøre, Jan Joensen og so Kurt Mørkøre, sum ikki tykist ætla sær at spæla við hesa ferð.

Tá KÍ fyri fimm árum síðani var í Budapest, sá liðið soleiðis út: Gunnar á Steig – Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Jóannes Jakobsen, Símun Waag Høgnesen, Heðin á Lakjuni – Eyðun Klakstein, Jan Joensen, Arnold Joensen (Jóhan Lützen, 88.), Rógvi Jacobsen – Kurt Mørkøre (Sørin Petersen, 46.). Ta ferðina var núverandi málverjin, Meinhardt Joensen, á beinkinum saman við Niclas Niclasen og Kristian Andreasen.

KÍ ferðalagið verður aftur í Vágum fyrrapartin í morgin. Landskappingardysturin hjá KÍ í 14. umfarinum er í skipanini útsettur til mánakvøldið. Tá skulu klaksvíkingar norður á Mølina á Eiði.

## Milton heiðraður

**Væntandi brotsspørkini til Toda í FCK-Brøndby dystinum eru millum beinleiðis atvoldirnar til, at danski altjóða fótbóltsdómarin nú hevur fingið serstaka virðisløn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kim Milton Nielsen, sum føroyingar helst kenna best frá tveimum væntandi brotssparksdómum í stórdystinum millum FCK og Brøndby, hevur nú fingið sokallaðu Lundberg-virðisslønina, sum á hvørjum ári verður latin persóni, sum hevur sýnt góðan ítróttarsið.

Hóast Todi Jónsson helst heldur vildi havt fingið danska meistaraheitið, so er føroyski landsliðsleikarin ein av beinleiðis atvoldunum til, at Milton nú hevur fingið hesa virðisløn.

Í grundgevingunum fyri



*Kim Milton Nielsen fekk av at vita í fjølmiðlunum eftir dystin millum FCK og Brøndby í fjør, tá hann í tveimum førum lat vera við at geva Toda Jónsson brotsspark*

handanina verður millum annað sagt, at hóast dómarin í vár fekk nógvar ákoyringar á seg, og millum annað mátti lata sær lynda at verða nýttur í eini lýsing hjá brillufyritøku eftir væntandi brotssparksdómar, so hevur hann framhaldandi sama alsk til fótbóltsspælið, sum áður.

## Skotar rigga til

**Berti Vogts hevur fyribils tikið út 25 leikarar til landsdystin móti Føroyum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Týski venjarin hjá Skotlandi, Berti Vogts, er í ringum skørum, nú hann fyri fyrstu ferð skal leiða liðið í einum teljandi dysti. Undan hesum dystinum hevur Vogts staðið á odda fyri liðnum fimm ferðirnar, og hvørja ferð hevur talan verið um tap, og hetta er vánaligasti byrjanin, sum nakar skotskur landsliðsvenjari hevur havt.

Tí er lítið at ivast í, at Vogts ræðist eini endurtøku av javnleikinum, sum Føroyar fingu móti Skotum, tá Hans Fróði í seinastu løtu stútaði eitt hornaspark í kassan á Svangaskarði. Um so er, verður talan um eina endurtøku, sum væl kann kosta týskaranum venjarasessin, longu áðrenn hann veruliga er komin ígongd.

Til dystin móti Føroyum hevur Vogts í fyrstu atløgu sent boð eftir 25 leikarum. Hetta tal verður tó seinni skorið niður í 18 mans, men at somikið nógvir eru boðsendir til bruttohópin, ber boð um, at venjarin ivast nógv í, hvørjar leikarar hann skal seta sítt álit á.

Í skotsku miðlunum verður nógv gjørt burtur úr, at miðvøllruin ikki riggar nóg væl, men hóast hetta, so er lítið at ivast í, at leikarar sum Barry Ferguson og Paul Lambert fara at teljst millum tryggu evnini til miðvøllin.

Umframt teir báðar, sum spæla við ávíkavist Rangers og Celtic, so telir skotska liðið fleiri leikarar úr júst hesum báðum feløgum, umframt at talan í stóran mun er um leikarar, sum hava sína dagligu gongd í bestu deildunum í ávíkavist Onglandi og Skotlandi.

Teir 25, sum eru við í skotska bruttohópinum eru annars hesir:

Neil Alexander (Cardiff), Robert Douglas (Celtic), Paul Gallacher (Dundee), Graham Alexander (Preston), Stephen Crainey (Celtic), Christian Dailly (West Ham), Maurice Ross (Rangers), Robbie Stockdale (Middlesbrough), David Weir (Everton), Lee Wilkie (Dundee), Barry Ferguson (Rangers), Scot Gemmill (Everton), Paul Lambert (Celtic), Derek McInnes (WBA), Kevin McNaughton (Aberdeen), Dominic Matteo (Leeds), Gary Naysmith (Everton), Scott Severin (Hearts), Gareth Williams (Nottingham F.), Stephen Crawford (Dunfirmline), Paul Dickov (Leicester), Scott Dobie (WBA), Allan Johnston (Middlesbrough), Kevin Kyle (Sunderland), Steven Thompson (Dundee).